# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Marjun Joensen King 60 ár

Í dag, mikudagin 2. august, verður Marjun Joensen King 60 ár. Hon er ættað úr Leirvík og hevur búð nógv tann størra partin av lívinum uttanlands. Kanska fleiri komast við hana frá sjónvarpssendingini Ymisk lív.



Foreldrini hjá Marjun eru Solborg, sum er ættað úr Gerðum í Klaksvík, og John Joensen á Geilagarði í Leirvík. John doyði í 1990. Børnini hjá Solborg og John eru Sofus (1941) í Leirvík, Jákup (1944) búði í Leirvík. Hann doyði í november í 2005. Marjun, Jósleiv (1948) í Leirvík, Anna Absalonsen (1952) í Havn, Ingvar (1953) í Leirvík, Sólbjørg Petersen (1956) í Havn og Jónvør Christiansen (1961) í Havn.

Marjun droymdi um at gerast korrespondentur, og dreymurin gjørdist til veruleika, eftir at hon hevði verið víða og lært mál. Blaðung fór hon til Havnar at tæna og ganga í handilsskúla um kvøldarnar. Hon var eisini í Klaksvík, har hon gjørdi handilsskúlan lidnan.

Marjun lærdi spanskt í Spania, týskt í Týsklandi, eingilskt í Onglandi og franskt í Fraklandi, har hon eitt skifti var í trúboðanarfelagsskapinum OM. So lærdi hon til korrespondent í sponskum og eingilskum í Keypmannahavn. Hon var liðug miðskeiðis í sjeyti árunum. Eftir tað arbeiddi hon eitt stutt skifti í Útvarpi Føroya og síðani á nýstovnaðu Frímerkjadeildini hjá Postverkinum.

Lívsstarvið hjá Marjuni var í EEC ella ES, sum tað nú verður nevnt. Hon arbeiddi fyrst í Brússel, so varð hon útsend til Tel Aviv í Ísrael í fimm ár, og miðskeiðis í áttati árunum flutti hon til London. Har skuldi hon eisini havt verið avmarkaða tíð, men eftir at hon varð gift og búsett í London, helt hon fram at arbeiða á ES skrivstovuni har, inntil hon í fjør legði frá sær.

Marjun giftist í 1990 við James King, sum er ættaður úr London. Tey giftust í All Souls kirkjuni mitt í London. Har kenna tey seg heima, og har hava tey hitt nógvar føroyingar.

Tá ið dugnalig, fryntlig, fyrikomandi og hjálpsom føroysk kvinna hevur verið á ES skrivstovum í fleiri londum, so hava føroyingar á so ymiskum hátt fingið gagn av hesum. Eitt nú politiski myndugleikin, embætisstættin, vinnulívið, einstaklingar og ikki minst pressan og eisini Sosialurin. Saman við øðrum dugnaligum fólkum sum Louis Wilson og Kate Sanderson hevur Marjun mangan vart føroyska borg, ikki minst tá ið ágangurin uttan í heimi hevur verið stórur orsaka av herferðum móti grindadrápi. Eisini hevur Marjun verið ein av stuðlunum í føroyska umhvørvinum í London.

Marjun og James eru sera hjálpsom, og tey eiga vinfólk nógva staðni á knøttinum. Teimum dáma væl at ferðast, og tey hava víðgreinað áhugamál. Marjun hevur altíð lisið nógv, og hon hevur søguligt innlit og fylgir væl við í gongdini kring heimin. Ikki minst í Miðeystri og Ísrael, sum hon altíð hevur havt serligan áhuga fyri og tokka til.

Hóast hon hevur verið burturi úr Føroyum í so mong ár, so hoyrist lítið til tað á góða føroyska bygdarmálinum. Hon vitjar ofta mammuna og restina av familjuni í Føroyum, og hon og James hava ofta føroyska vitjan í Ealing í London, har tey búgva.

Á 60 ára degnum í dag er møguleiki at heilsa upp á Marjuna í brøðrasalinum Hebron í Leirvík, har øll eru hjartaliga væl komin frá klokkan 18 í kvøld.

**J**

## Brynhild Absalonsen 90 ár

Hósdagin 3. august fyllir Brynhild Absalonsen í Klaksvík 90 ár.



Brynhild er ættað av Viðareiði. Foreldrini vóru Sára, ið var ættað av Skælingi og Olaf, ið var ættaður av Viðareiði. Sára og Olaf giftust í 1910 og búsettust á Viðareiði. Sára andaðist longu í 1928, og øll árini hon búði á Viðareiði var hon bert einaferð aftur og vitjaði heimbygdina Skæling. Soleiðis vóru ferðaumstøðurnar tá í tíðini.

Brynhild er triðja barnið í einum systkinaflokku uppá seks. Hini systkini vóru Haldur Olafsson (f. 1912), Arni (f. 1914), Herborg Gunnarsson f. 1918, Solveig Joensen f. 1920 og Heini Svarthamar f. 1922. Umframt Brynhild er Solveig framvegis á lívi.

Í 1939 giftist Brynhild við Stefan, ið eisini var ættaður av Viðareiði. Fyrstu árini búðu tey á Viðareiði, men í 1948 fluttu tey til Klaksvíkar, har tey bygdu á Gerðareiði.

Brynhild og Stefan fingu 6 børn, og sum hjá so mangari føroyskari konu miðskeiðis í farnu øldini, so var tað leikluturin hjá Brynhild at hava ábyrgdina av børnunum og heiminum, meðan maðurin stóran part av tíðini var burturi á føroyskum og stundum útlendskum kjøli.

Stefan andaðist í november 1999, fáar dagar eftir at tey høvdu hildið diamantbrúdleyp. Tey høvdu sína trúgvu gongd í samkomuni í Betesda og vóru hollir stuðlar hjá Zarepta á Vatnsoyrum. Gestablídni, gudsótti og friður eyðkendu hesi fyrimyndarligu hjúnini, ið vóru eitt prýði fyri Klaksvíkar bý.

Hóast Brynhild nú hevur rokkið teimum 90 er hon framvegis gløgg, skilagóð og áhugaverd at koma á tal við. M.a. hevur Óli Jacobsen á FF blaðnum prentað nakrar sera áhugaverdar samrøður við Brynhild.

Tvey av børnunum hjá Brynhild eru ikki okkara millum longur. Jóhannes, sum var føddur í 1940, druknaði á Vánni í Klaksvík í 1968. Sára, sum var fødd í 1944, doyði av sjúku í 2000. Hini børnini, Árni, Elsa, Olav og Símun búgva øll í Havnini.

Brynhild eigur 15 ommubørn og 7 langommubørn.

Føðingardagurin verður hildin í Skálanum í Klaksvík, har vælkomst er frá kl. 16.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk veita vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust pápa, abba og langabba okkara

**Pætur Franklin Sørensen**
Klaksvík

tá hann andaðist og varð borin til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Sunnuva, Ragnhild og Birna**

## Andlát og jarðarferðir

**Marin Muldbjerg**, fødd **Davidsen**, ættað úr **Haldarsvík**, búsitandi í Aalborg, andaðist mánadagin 31. Juli, 74 ára gomul.

**Jákup Jensen**, vanliga nevndur Jákup á Skipagøtu, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 1. august, 86 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 14. Jarðarferðin verður úr Skúvoyar kirkju fríggjadagin kl. 12. Í sambandi við jarðarferðina siglir Sildberin av Sandi fríggjadagin, umleið kl. 11, í sambandi við túrin av Gomlurætt kl. 9.45.

**Hákun Frimodt Joensen**, **Tórshavn**, ættaður úr **Sumba** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 1. august 81 ára gamal. Bønarhald verður í Kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 3. august klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 4. august kl. 13.

**Jóhan Hendrik Højsted**, **Hvalvík** vanliga nevndur **Henniba** andaðist sunnudagin 30. juli 85 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld kl. 20. Jarðarferðin verður úr Hvalvíkar kirkju í morgin hósdagin 3. august klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra móðir og vermóðir

**Inga Hansina Weihe**
Skála

andaðist á Landssjúkrahúsinum 1. august,
87 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagon 3. august kl. 18 í Skála kirkju.
Jarðarferðin verður fríggjadagin 4. august kl. 14.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Familjunnar vegna*
**Kári og Majbritt**

Tey, ið ynskja at minnast Ingu Hansinu, kunnu lata eina peningagávu til Skála kirkju. Konta í peningastovnunum.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi og abbi

**Robert Poulsen**
Hoydalar

andaðist í heiminum ólavsøkumorgun,
74 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Annika, Beinta og Andras**

Tey, ið ynskja at minnast Robert, kunnu lata eina peningagávu til Krabbameinsfelagið. Konta í peningastovnunum.